# uppgearaðum súkklara



*Tað er gott at hava eina súkklu við fimm gearum, tá ein skal niðan í fjøllini. Men hjá Martini Joensen var øðrvísi – her riggað bert tað eina!*

## FAKTA

**90 kilometrar**

Teir 90 kilometrarnir hjá Martini úr vesturbýnum í Havn, eftir Oyggjarvegnum til Eiðis, Funning og til Hellurnar býta seg soleiðis, eftir upplýsingum frá Landsverki:

| | | |
|---|---|---|
| Havn (Oyggjarvegurin) – Kollafjørður við Sjógv | = | 26 km |
| Kollafjørður – vegamótið Eiði | = | 30 km |
| Eiði – Funning | = | 13 km |
| Funning – Funningsfjørður | = | 7 km |
| Funningsfjørður – Hellur | = | 14 km |
| **Í alt** | **=** | **90 km** |

skuldi súkklað úr Funningi og niðan á skarðið.

Hóast Martin nærkaðist hægsta staðnum á hesi leiðini, og nú hevði undanbrekka allan vegin oman til Funnings, var hetta ikki síðsta brekkan hann skuldi sigra á seinnapartin í gjár.

Ætlanin var at koma á Hellurnar einar tríggjar tímar seinni, haðani konan er ættað og frammanundan farin við fleiri børnum í eini hús, ið hon hevði arvað.

- Hon er farin hagar at fyrireika ein føðingardag hjá ommusoninum, sum verður í morgin (tað er: fríggjadag).

- Men eg skuldi helst verið komin uppá pláss áðrenn tað!, sigur Martin við einum brosi.

Hiðani av Eiðisskarði til Hellurnar væntaði hann at brúka einar tríggjar tímar, soleiðis at hann var frammi hjá konu og abbabørnum sínum um seks tíðina um kvøldið.

Óvist er, um hann hevur lagt ferðina so nágreiniliga til rættis. Í øllum er tað ein sannroynd, at klokkuni vantaði ikki nógvar minuttir í seks, tá Martin við brosi á kinn kom súkklandi eftir vegnum á Hellunum!

> *Væl hevur súkklan fimm gear, men ólukkutíð fyri Martin so riggaði bert eitt teirra*

### Kanska ein túr aftrat

Martin hevur altíð dámað væl at taka súkkluna, tá smærri ørindi skuldu gerast í Havn. Hann hevur kortini eisini verið longri súkklutúrar í Skotlandi, ikki færri enn tvær ferðir, við dóttrini og einum abbasoni í 1989 og aftur í 1992.

Men at fara á eina slíka ferð úr Havnini til Hellurnar í einum og sama degi, tað krevur bæði áræði, hug, kondisjón og rættiliga gott tol.

- Tú veit, hvussu tað er: Man hevur slíkar útfordringar í høvdinum viðhvørt.

- Eg havi fyrireikað hetta í eina tíð, og nú eri eg komin í helvt. So hetta man fara at ganga tað seinasta strekkið, sigur hann bjartskygdur og als ikki so pøstur, sum onkur kundi hildið.

Summi vildu helst mett, at ein maður í so høgum aldri fór at gera henda eina túrin, og síðani seta súkkluna í skúrin for good.

Men tað er kortini ikki vist, at Martin fer at gera tað.

- Nú taki eg henda túrin fyrst. Og so kann altíð henda, at eg geri ein túr aftrat onkutíð seinni.

> *Eg haldi ikki, at tað er serliga stuttligt at koyra gjøgnum ein langan tunnil. Tá er munur á at fara niðan í fjøllini*



*Súkklan er bæði tung og hevur sæð sínar bestu dagar. Hetta forðaði kortini ikki Martini Joensen at leggja til brots. – Dótturin átti hana, men eg haldi at hon var ov tung til hana, sigur hann, meðan hann rindar sær møðina eina løtu*

## Vatn og banan

Tá talan er um onnur stór brøgd, sum menniskju hava framt gjøgnum tíðirnar, er hetta eitt úrslit av planlegging í nógv ár fyri at røkka máli sínum.

Tá talan er um hesa ferðina hjá Martini hevur planleggingin ikki vart í so langa tíð – og súkklan heldur ikki júst ein slík, sum teir røttu Tour-menninir brúka.

- Nei, í so máta havi eg ikki fyrireikað meg serliga væl. Hygg bara eftir súkkluni. Hon er gomul og hon er eisini tung at súkkla við.

Tað er eisini neyðugt við góðum kosti til eina slíkan túr. Í einum posa á viðførisberaranum var ein posi festur, og her hevði hann lagt bæði bananir, súrepli og okkurt annað gott.

- Vatn havi eg ikki tikið við. Tað eru áir allastaðni fram við vegnum, so tað fái eg haðani, sigur Martin.

Tá ein leggur út á slíka ferð er sjálvandi umráðandi at ein mentalt er fyrireikaður uppá allar tær avbjóðingar og forðingar, sum kunnu møta einum á ferðini.

Ein tann størsta avbjóðingini hjá Martini mundi vera, um orkan framvegis var nóg stór til at hann kundi megna at fullføra ferðina.

- Hetta hevur verið ein strævin túrur, men kortini ikki strævnari enn eg hevði væntað, sigur ídni súkklarin.